## DAGSINS MEINING

# Virðing - semjur og stabilitet

Formaður Javnaðarflokksins hevur í valstríðnum støðugt víst á nøkur grundleggjandi viðurskifti og á nakrar avgerandi fortreytir fyri at komast kann burtur úr tí politisku naggatódn, sum hevur eyðkent almenna lívið seinastu árini. Formaðurin hevur víst á, at Javnaðarflokkuirn hevur tað góða samfelagið sum mál. Javnaðarflokkurin raðfestir tí tað góða samfelagið fram um alt annað. Ì øðrum lagi merkir hetta, at í tí góða samfelagum er tjóðskaparliga semjan um sjálvstýri Føroya eitt virðiligt og sjálvsagt mál. Tann breiða tjóðskaparliga semjan um einar sjálvstøðugar Føroyar innan ríkisfelagsskapin skal tryggja okkum orku og arbeiðsfrið til at byggja tað góða samfelagið.

Tað góða samfelagið er samfelagið fyri øll og ikki bert fyri tey fáu. Tað góða samfelagið er eitt samfelag, har eldri og gomul verða viðfarin við sóma og virðing, har tey fáa hjálp og røkt, sum er á støði við tað besta í okkara grannalondum. Í tí góða samfelagnum eru rættartrygd og persónligt frælsi, solidaritetur og sosialt rættvísi, góð barnakor, útbúgving, mentan og list, góður bústaður sjálvsøgd og høgt raðfest mannarættindi.

So mikið um tann ítøkiliga politiska boðskapin. Men formaður Javnaðarfloksins hevur eisini staðiliga mælt til, at tað kemur eitt annað lag á føroyskan politikk. Hann hevur víst á, hvussu skaðiligt tað vánaliga arbeiðslagið er, og hann hevur somuleiðis víst á tørvin av eini betri politiskari atmosferu í Føroyum. Í hesum viðfeingi hevur formaður Javnaðarfloksins undirstrikað týdningin av breiðum semjum um ávísar stórar politiskar spurningar t.d. sjálvstýrismálið, pensiónsmálið, fiskivinnupolitikkin og familjupolitikkin. Í framhaldi av hesum hevur Jóannes Eidesgaard mælt til størri sínamillum virðing hjá politiskum mótstøðufólkum fyri sjónarmiðunum hjá hvørjum øðrum. Hann hevur somuleiðis mælt til at leggja gamalt agg, har slíkt finst, burtur og hann hevur mælt sínum politisku starvsfeløgum í øðrum flokkum til saman við sær at vaska talvuna reina og at byrja av nýggjum. Hann hevur mælt til størri tolsemi og virðing ikki bert í politikki men eisini manna millum.Hann hevur mælt til, at vit nú fara at byggja brýr millum føroyingar heldur enn at dýpa tær gjáir, sum tað harða politiska veðurlagið hesi seks árini hevur elvt til.

Vónandi fara flokkar og veljarar at geva boðskapinum frá formanni Javnaðarflokksins gætur, so at vit eftir valið fáa eina arbeiðsføra stjórn og eitt betri politiskt veðurlag í Føroyum. Vit hava øll brúk fyri stabilieti og støðugum politiskum viðurskiftum. Latið okkum tí seta virðingina fyri hvørjum øðrum aftur í hásæti og við henni geva tí góða orðinum, tí góða dialoginum og tí góða samstarvinum veruligt innihald. Hesi eru fortreytin fyri góðum úrslitum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vorðið dýrari at liva í Føroyum

**Magnus Juel Petersen**

**Harra blaðstjóri**
Hýsið mær hesum reglum, so at vit áðrenn vit fara á val hyggja at hvat Tjóðveldisflokkurin hevur megnað at gera av ólukkum fyri okkum føroyingar.

Fyrst av øllum kann nevnast skúlabørnini (framtíðin) hjá Føroyum hava gingið heima upp í mánaðar, 6-7 ferðir orsakað av verkføllum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tók samráðingarrættin frá verkafeløgunum.

Tá ið viðkomandi boðaði, at feløgini ikki máttu fáa meira enn eitt vist % í lønarhækking um árið sigast kann at súrepli dettur ikki langt frá trænum ella hvat? So tjóðveldis arbeiðsmenn tit skuldu hugsa tykkum væl um nú.

Á Almanna/heilsuøkinum er standurin ikki ringur, men hann er heilt óbegríbeliga vánaligur, var til pallborðsfund hjá Heilafelagnum, tá ið tað kom fram, at fólk, sum fingu heilabløðing ella aðra sjúku og vóru óhjálpin, vildu eftir tað viðgerð, tey nú einaferð kundu fáa á hospitalinum so vóru útskrivaði og send heim, men tey fingu onga heimahjálp tí tað vóru ikki pengar til hesi fólkini. So stakkals tey, sum blíva sjúk í Føroyum, ímeðan tjóðveldismennirnir ráða. Tey koma á ein bíðilista til pengar eru til taks. Eg spurdi landstýrismannin í almannamálum um hesi fólkini ikki vóru meiri verd enn tað at vera sett á ein bíðilista, var svarið eg fekk, at tað var ein góður spurningur – tí at landsstýrið hevði valt at prioriterað soleiðis. Tit skuldu skamma tykkum at virða landsmenn tykkara so lítið.

Eitt annað mál, sum eisini skuldi pilkast við, er rentustuðulin á sethúsalánum, hann skal setast niður/-burtur, so tey sum eru hart spent fíggjarliga skulu fáa stein oman á byrðu, jú tað skal loysa seg at vera tjóðveldisfólk tillukku???

Bommtollur og sodavatnsskattur tað er nakað sum kann tryggja landinum eina seriøsa og væl gjøgnum hugsaða loysing.

Tó tað verður nokk ringt fyri tannlæknar at fáa endarnar at hanga saman, men teir skulu nokk klára at fylla okkurt í tey fíggjarligu holini hjá tjóðveldinum.

Frukt/grønmeti og mjólk skulu eisini dýrka, jú skattirnir eru nógvir og eita ymiskt – kært barn har mange navne.

Sjónvarpsgjaldið fór eisini upp, og góðskan bleiv ikki betur, men heldur umaftur.

Samanlagt kann sigast, at hesi árini ímeðan tjóðveldissamgongan hevur sitið, er tað blivið nógv dýrari at búgva í Føroyum. Kæru landsmenn vísið tykkara ónøgd fái hesar menninar burtur frá valdinum.

Gott val.

# Somu vallyfti

**Óløf Tungá**

Eg eri farin at ivast í, um okkara politikarar hava fingið Alzheimer. Hava tit gloymt, at tit lova somu lyftir til hvørt valið, og nú er tað so stutt ímillum valini, at tað skuldi ikki kunna latið seg gjørt at gloyma so skjótt, uttan ein hevur fingið Alzheimer.

Eg havi arbeitt í heimarøktini í 7 ár, og tað hava verið minst 3 val síðan eg byrjaði og tað hevur ongantíð verið so ringt at verið gamal, ella á annan hátt óhjálpin, og hava brúk fyri eini heimahjálp. Eg vildi ynskt at eg kundi fingið tann møguleikan at svara einum av tykkum, um tit fáa brúk fyri hjálp, tíverri, ring aftur um 3 vikur, og hava tit lív lagað, so koma tit einaferð at trakka í teir súru skógvar, sum hesi stakkals menniskju eru í. Hugsið tykkum um dustsúgvarin ikki bleiv tikin fram í 4 vikur heima hjá tykkum, í fjør blivu tað 8 vikur, os eg veit ikki um tað vera 12 vikur í ár. Ella um tit fáa at vita at tit kunnu fáa kvøldvakt ella morgunvakt, ikki bæði. wc og mat má avvarðandi taka sær av, tá tey koma frá arbeiði.

Heilt erligt, eg haldi at hetta er langt úti, minnist til, vit eru í 2004, ikki 1904. Kanska eru tit umskyldir, tí tit vita onki um hesa støðu, men hvat við at kanna støðuna áðrenn tit tveita lyftir til høgru og vinstru og við ongari adressu?

Eg havi eitt hugskot, havi eitt val hvørt ár og útfylli eitt lyfti um árið, ikki 100 lyftir og onki útfylt, so vera vit øll glað og velja eftir tørvi.

VARPIÐ
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14⁰⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Tinghellan - val 04

**Vit hava á Tinghelluni roynt at viðmerkt ymisk evni í sambandi við løgtingsvalið**

*Bogi Eliasen*



Í hesi grein er ætlanin at taka samanum valstríðið. Støðið verður tikið í valskráunum, men eisini verður komið inn á aðrar partar av valstríðnum. Men ikki ber til at taka hædd fyri øllum framførdum sjónarmiðum, tí valgreinarnar hava verið so rúgvismiklar, at ringt er at lesa tær allar, eins og tað ikki ber til at verða til staðar á øllum valfundum og tiltøkum, eins og at fylgja við á fleiri útvarpsrásum og í sjónvarpinum í senn.

Men eg fari at hætta mær undir at royna at býta flokkarnar upp eftir ávísum evnum. Grundleggjandi er tað tann gamli vinsrahøgra, umframt loysing og samband og síðani hyggja, um tað eru tann vegin floksbýtið enn er í Føroyum. Hin Stuttligi Flokkurin, verður bert nevndur innan øki hann hevur markerað seg.

Vanligt hevur verið kring heimin, ið hvussu so er í vesturheiminum at býta politikkin í vinstra og høgra. Mær dámar betri at brúka organist og individuelt, tí í veruleikanum er eingin munur á uttast høgra og uttast vinstra, og rættast er kanska at tekna eina ringrás, heldur enn eina beina linju.

Organist merkir í hesum føri, at einstaklingurin er partur av einari heild og heildin er tann týdningarmesta. Í tí individuellu ásjónini er einstaklingurin friðhalgaður

## Klassiskt vinstra - høgra Skattur, einstaklinga rættindi

Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin ætla at seta skattin niður. Teir hava eina liberala trúgv uppá, at hetta fær samfelagshjólini at mæla skjótari. Teir meta eisini at skattalætti gevur tí einstaka meira frælsi. Sjálvstýrisflokkurin arbeiðir fyri at fáa lægri skatt, men ikki skattalætta beinanvegin.

Flokkurin sigur seg sjálvan verða ein sosial-liberalan flokk.

Miðflokkurin er uttast høgra, hann er organiskur, tí tað eru ikki einstaklingurin sum skal tryggjast. Hetta sæst í teirra ásjón á samkynd, sum teir meta skula til avvenjingar. Hinvegin leggja teir stóra áherðslu á tað einstaka lívið í fosturtøkuspurninginum, sum tá skal verjast. Miðflokkurin ynskir, at tað skattaliga skal verða fyrimunur at verða giftur.

Javnaðarflokkurin heldur fast um síni sosialdemokratisku virðir, og hugsar fyrst um tað sum fæst fyri skattapengarnar er gott nokk. Fyrst vælferð og síðan skattalætta. Hjá Javnaðarflokkinum er tað fyrst umráðandi at hugsað um tey veiku á samfelagnum. Javnaðarflokkurin er sostatt vinstrumegin miðjuna, har tað er meiri umráðandi at verja at hava pláss fyri minnilutum og at verja tey veiku í samfelagnum, heldur enn at geva einstaklinginum so nógv frælsi, sum gjørligt.

Tjóðveldisflokkurin leggur størst áherðslu á ríkisrættarligu støðuna, og kann tí sigast at verða ein nationalur flokkur á tí økinum. Flokkurin leggur ikki upp til skattalætta, men at skattapengarnir verða væl brúktir og skattalætta um tað ber til fíggjarliga. Flokkurin hevur flutt seg frá at verða vinstra flokkur í búskaparmálum, til at hava eina sera liberala fatan av vinnuni, og tekur harðliga frástøðu frá møguleikanum fyri studningi til vinnuna.

## Vælferðarsamfelagið

Munur er á møgulleikunum hjá flokkunum høgru megin miðjuna í okkara størri grannalondum, tí har ger støddin á londunum tað møguligt at hava privat alternativ á vælferðarøkjum. Í Danmark t.d. er hvørki Vinstra ella Konservativu ímóti vælferðarsamfelagnum, men vilja gjarna hava kapping á hesum øki, soleiðis at privat kunna bjóða teimum almennu tænastunum av. Tað ræður sostatt ikki um at avtaka vælferðarsamfelagið, men at tann einstaki kann velja millum ymsar møguleikar, tað er valfrælsi, sum er avgerandi. Hvørki Fólkaflokkurin ella Sambandsflokkurin ætla at skerja vælferðarsamfelagið. Skattalættin skal fíggjast við øðrum miðlum.

Sjálvstýrisflokkurin, Tjóðveldisflokkurin og Javnaðarflokkurin vilja ikki skerja vælferðarsamfelagið, men fokusera uppá, hvat fæst fyri skattapeningin. Miðflokkurin grundar vælferðarsamfelagið á Bíbliuna.

## Fiskivinnupolitikkur

Tjóðveldisflokkurin er einasti flokkur, sum greitt burturvísur møgulleikanum fyri at veita vinnuni stuðul. Eingin flokkur tosar um at veita beinleiðis vinnustuðul, men afturvísa heldur ikki møguleikanum til kreppuraktu ali- og rækjuvinnuna. Allir flokkarnir tosa um at skapa betri karmar og gransking á økinum, soleiðis at vit fáa skapt eina betri virðisøking av fiskaframleiðslu.

Bert Hin Stuttligi Flokkurin hevur tora, at sagt at serligi skattafrádrátturin til fiskimenn skal avtakast. Í búskaparhøpi er serligur skattalætti til ávísar bólkar, tað sama sum stuðul, Munurin er bert, at ístaðin fyri at tað kemur inn á bankabókina, verður tað trekt av í skatti.

## Miðspjaðing og rationalsiering av miðfyrisitingini

Allir flokkarnir ganga inn fyri miðspjaðing, men ynskja samstundis at rationalisera almenna sektorin. Vit hava á Tinghelluni sett spurnaðartekin við, um tað ber til. Men sakna ynskir og leistar frá politikarunum, um hvørja nágreiniliga ætlan teir hava, og hvat endamálið við miðspjaðingini skal verða.

## Eldri og børn

Flokkarnir eru samdir um, at eldraøkið skal betrast munandi. Men eisini her mangla visiónir, hvussu skal tað endaliga eldraøkið síggja út?

Viðvíkjandi børnum tosa onkrir flokkar um barnapengar og at pengarnir skula fylgja barninum, soleiðis at um eitt foreldur hevur hug at ansa sínum barnið, fær tað pengar fyri tað. Serliga Fólkaflokkurin og Miðflokkurin hava havt hetta frammi, men Sambandsflokkurin tóktist ikki at hava nakað ímóti hesum. Sjávstýrsflokkurin vil hava barnaansingartrygd og at børnini verða stimbraði á dagstovni. Systkinaavsláttur hava bæði Miðflokkarin og Javnadarflokkurin í teirra valskrá, men allir flokkar tykjast vilja arbeiða við hesum.

Her haldi eg tó, at tað er vert at minnast til, at stuðul og eyka skattafrádráttur í princippinum er tað sama. Tann fyri kemur til tín, meðan tann seinni ongantíð fer av bankabókini og barnafamiliur fáa skattafrádrátt.

## Útbúgving og Gransking

Allir flokkar tykjast vera á einum málið um, at tað er serstakliga umráðandi at menna gransking og útbúgving. Men tað er munur á flokkunum. Javnaðarflokkurin vil hava ókeypis frálærutilfar á miðnámsskúlunum og at vinnugranskingin skal mennast. Sjálvstýrið ynskir at menna og styrkja Fróðskaparsetrið. Tjóðveldi ynskir at spjaða undirvísing og gransking kring landið í deplar. Men allir flokkar vilja styrkja hetta øki.

## Umhvørvið

Sambandsflokkurin førir fram, at vit skula taka altjóða ábyrgd á umhvørvisøkinum. Javnaðarflokkurin leggur dent á alternativa orku, eins og Sambandsflokkurin. Sjálvstýri ynskir eina umhvørvisvernd. Tjóðveldi vil eisini hava alternativa orku og ein granskingastovn fyri havumhvørvi og veðurlagsbroytingar. Miðflokkurin heldur at tað er neyðugt at arbeiða við eini hugburðsbroyting.

## Samferðslunetið

Allir flokkarnir tykjast at vera á einum máli um, at samferðslunetið skal útbyggjast munandi og undirsjóvartunnil til Sandoynna verður nú roknað sum verkætlanin aftaná Norðoyatunnilin.

## Uttanríkispolitikkur

Allir flokkar siga seg verða fyri víðari ræsum í samband við sjálvstýri. Sambandið sigur seg eisini ganga inn fyri meiri sjálvstýri enn vit hava í dag í sínum nýskipanaruppskoti. Javnaðarflokkurin hevur eina tjóðskaparligu semju, men eins og allir hinir flokkarnir vísa á, at Føroyar skulu hava tað avgerðandið orðið og harvið sjálvsavgerðarrættin.

Undantikið Sambandið og Tjóðveldisflokkinum, eru flokkarnir sera flákrandi, men allir siga seg vilja hava meiri sjálvstýri enn í dag. Her er enn ein klár polarisering ímillum

*Framhald á næstu síðu*

